# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Alma Askildsen 70 ár



Í dag, 19. februar, fyllir Alma Christina Askildsen í Havn 70 ár.

Alma er fødd og uppvaksin í Klaksvík. Foreldur hennara vóru Elias Sofus Berg, ættaður úr Elduvík, og Anna Elisabeth Hansen, ættað av Norðoyri.

Lisa og Lias, sum tey vanliga blivu rópt, búðu fyrst trý ár í Elduvík, men fluttu húsini til Klaksvíkar í 1934-35.

Í 1964 seldu tey húsini og fluttu til Havnar.

Tey fingu trý børn. Eli, Almu og Arna.

Alma fór sum 17 ára gomul til Havnar í húspláss ymsastaðni, og síðani fekk hon handilspláss hjá Mariu Poulsen. Beint eftir at hon var komin til Havnar, fór hon upp í sangkórið í Ebenezer, har hon gekk á møti. Og nú hon fyllir 70 ár, er hon enn virkin í kórinum.

18 ára gomul kom hon at kenna Jens Christian Cornelius Askildsen úr Havn. Jens var sonur Sunnevu Fridrikku, fødd Guttesen, úr Havn, og Olaf Askildsen úr Kristiansand í Noregi.

Tey giftust í 1958 og fluttu inn í nýggj hús í Leivsgøtu.

Í 1958 fór Alma at arbeiða í Ullvøruhúsinum.

Tey fingu trý børn. Í 1959 fingu tey Eyðgerð, í 1963 Oddvør og í 1971 Brynleif.

Eyðgerð er gift við Jógvan Skýlindal, úr Havn og eiga sonin Páll. Oddvør er gift John Martin Olsen, úr Havn og eiga synirnar Boga, Bjarka og Teitur. Brynleif er giftur Ullu, fødd Poulsen, úr Havn, og eiga Frank, Almu og Jensu.

Alma og Jens vóru ógvuliga gestablíð, og nógv eru tey, sum hava gist hjá teimum til samfelagsmøtir og onnur høvir.

Eisini vóru tey sera virkin frá fyrst Zarepta í Vatnsoyrum varð bygt. Alma at kokkast og Jens sum handverkari at byggja Zarepta og svimjihylin.

Í 1989 andaðist Jens 61 ára gamal. Alma hevði tá verið heimaarbeiðandi í fleiri ár, men hon byrjaði at arbeiða á Blindastovninum 14 dagar aftaná at Jens var deyður, har hon arbeiddi millum tey blindu, líka til hon bleiv pensionerað.

Alma er sera hjálpsom, trúføst og positiv, situr ongantíð fyri einki, hon bakar, heintar ommubørn og gongur á kvøldskúla at brodera og gera mat.

Føðingardagin heldur hon heima hjá dóttrini Oddvør, í Djóna í Geilsgøtu 37, frá kl. 10 - 15.

Smiðjan í Litluvík:

## Randi og Malan listaframsýning í Smiðjuni



*Randi M. Gunnarsdóttir og Malan Rubeksen hava listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík til og við mikudagin 23. februar*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Hósdagin 17. februar 2005 kl. 12 lótu Randi M. Gunnarsdóttir og Malan Rubeksen upp eina framsýning í Smiðjuni í Lítluvík.

Framsýningin, ið verður til og við mikudagin 23. februar, er opin allar dagar frá 12-19, tó sunnudagin frá kl. 14-20.

Randi og Malan hava havt ymiskar framsýningar í Føroyum. Fyri einum ári síðan høvdu tær eisini eina framsýning í Smiðjuni, ið var væl vitjað, og nógvir málningar vórðu seldir.

Malan og Randi siga, at øll eru hjartaliga vælkomin til framsýningina.

### 100 ára føðingardagur

Sunnudagin 27. februar fyllir Karl Jacob Sigvardsen, Gjógv, 100 ár. Dagurin verður hildin við Gjógv frá kl. 13.30 til 17.00.

### 85 ára føðingardagur

Mánadagin 21. februar fyllir Andrea Magnussen, Søldarfjørður, 85 ár. Hon verður burturstødd.

### 70 ára føðingardagur

19. februar verður Alma Askildsen, Tórshavn, 70 ár. Dagurin verður hildin frá kl. 10.00-15.00 heima hjá Oddvør og John Martin í Djóna í Geilsgøtu 37.

### Brúdleyp

Í dag, 19. februar kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Irdi Lið Johansen og Jørgen Jónsvein Gaardlykke, Miðvágur. Vælkomst verður í heiminum frá kl. 19.00.

### Silvurbrúdleyp

15. februar høvdu hjúnini Lis og Zacharias Zachariassen í Norðragøtu verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 19. februar, har opið hús verður frá kl. 16.00-22.00.

### Prógv

Ásla Eirikstein Prior, Miðvágur, hevur tann 2. februar lokið prógv sum Bachelor í Sálarfrøði á Københavns Universiteti.

Kári Holgarsson hevur 3. februar lokið prógv sum civilverkfrøðingur á DTU í Lyngby.

Hjørdis Kalsø Hansen frá Sakskøbing er vorðin cand. mag. í engelsk og sprogvidenskab frá Københavns Universitet tann 15. februar.

## Andlát

10. februar
Lítli Jens Harry Sakarisson Dimon, sonur Beintu og Sakaris.
Tummas Pauli Mortensen á Argjum, 55 ár.
Óla Jákup Gaard Olsen, vanliga nevndur Agga, Vestmanna, 76 ár.
Atli Jacobsen úr Sørvági, 52 ár.

11. februar
Per Juel Gaardbo, búsitandi í Leirvík, 32 ár.

12. februar
Else Høgnesen, Klaksvík, 92 ár.

16. februar
Andrias Joensen á Eiði, vanl. nevndur Andrias í Velinum, ætt. úr Haldarsvík, 87 ár.

### Dagurin

**19. februar. Ammon**, deyður umleið ár 250. Var ein av teimum rómversku hermonnunum, sum við at síggja dirvi og trúarvissu teirra kristnu, sjálvur gjørdist kristin og varð tikin av døgum.

**20. februar. Eucharias**, deyður á 788. Biskupur í Orleans, sum fyri fleiri undurgerðir varð skírdur halgimenni.

**21. februar. Sámuel**. Dagurin hildin til minnis um dómaran Sámuel, sum valdi og salvaði kongarnar Saul og Dávid (fyrra Sámuelsbók, kap. 1-25). Hebráiska navnið merkir *hoyrdur av Guði.*